Friggjadag 24. kl. 10.30

Visiónir um Europa
Lagt er upp til umfatandi broytingar innan landbúnaða og fiskiskap í samband við at ES nú verður víðkað eystureftir. Í sendingini verður hugt at, hvussu hesar broytingar koma at broyta tilveruna hjá teimum, sum verða rakt av sokallaðu reformunum.

Friggjadag 24. kl. 20.25

Dr. Dolittle 2
CANAL+

Djólalæknin, John Dolittle, sum vit eisini kenna sum Djóragóði, er nú aftur. Framvegis dugur hann væl at tosa við djórini, og hesa ferð er ein uppgáva hansara at fáa eina tama sirkusbjørn at bera seg at sum eitt veruligt villdjór. Sum í fyrra filminum er tað eisini Eddie Murphy, sum hevur høvuðsleiklutin her.

Friggjadag 24. kl. 22.30

Jay Leno
Hesaferð er tað filmssjónleikarin, Robin Williams, sum er gestur í sjónvarpsstovuni hjá Jay. Sum vera man, so fær hann spurningar av alskyns slag, sum hann so noyðist at svara eftir førimuni.

Friggjadag 24. kl. 23.55

Sjey
Somerset og Mills fáa frænir av einum hópdrápsmann. Skjótt síggja teir, at hvørt drápi ímyndar eina av teimum sjey deyðssyndunum. Men teir varnast ikki, at hópdrápsmaðurin hevur tikið teir báðar við í ætlan sína. Filmurin er óhóskandi fyri børn.
Leikarar: Brad Pitt, Morgan Freeman, Gwyneth Paltrow og Richard Roundtree.
Leikrit: Andrew Kevin Walker.
Leikstjórn: David Fincher.

Leygardag 25. kl. 13.40

Knívurin-loyniliga vápnið
Hollywood roynir at selja eina glæstrimynd um náttúrligan vakurleika, men sannleikin er, at meginparturin av hesum als ikki er náttúruskapt, men heldur er eitt úrslit av arbeiðinum hjá dugnaligum kosmetiskum læknum. Sjálvt Marilyn Monroe mátti undir knívin hjá hesum, men eins og nógvar aðrar stjørnur, duldi hon hetta sum mansmorð.

Leygardag 25. kl. 19.00

Marran hjá eini mammu
At síggja til sær hjúnarlagið hjá Maryanne út sum hjá teimum flestu. Kanska enntá betri enn hjá teimum flestu, men sannleikin er ein annar. Maryanne er fanga í eini sannari marru, har hon ongan tíð veit, nær næsta illsinnisglepsið við eftirfylgjandi harðskapi kemur frá manninum.

Leygardag 25. kl. 19.45



Diamantar vara ævigt
Vegurin hjá gimsteinum frá námunum í Suðurafrika til dýru juvelhandlarnar í Paris, New York og London. Steinarnir verða brotnir í kolaniðu, og áðrenn teir verða seldir skal nógv arbeiði til, soleiðis at endaliga vøran er so góð, sum yvirhøvur gjørligt.

Leygardag 25. kl. 20.00

SATSA
Luttakarar: Anna Rasmussen, Tórshavn, Óla Hans A. Olsen, skrivstovumaður, Tórshavn og Tórarinn Niclasen, lærari, Tórshavn

Sunnudag 26. kl. 13.55

Seria A: Lazio-Reggina
CANAL+

Hóast Lazio í summar var um at fara á húsagang, og hóast tað enn ikki tykist vera størvegis skil á fíggjarviðurskiftum felagsins, halda leikararnir á fram at spæla, sum um einki var hent. Sunnudagin fáa teir vitjan av Reggina, og fyri heimaliðið ræður um at halda fast í oddinum.

Sunnudag 26. kl. 20.00

Ein bátsferð kring Føroyar
Árni Johnsen er í Íslandi kendur sum politikari og vísusangari. Á okkara leiðum er hann mest kendur sum altingsmaðurin, sum í fjør mátti víkja tingsessin vegna avdúkingar um fíggjarsvik. Men millum íslendingar er maðurin úr Vestmannaoyggjunum mest kendur sum ein virkin ferða- og veiðumaður, ein náttúruromantikari og „naturens muntre søn". Summarið 2001 var Árni Johnsen saman við einum ferðalagi í Føroyum og ferðaðist kring oyggjarnar í opnum bátum. Burtur úr hesum er komin hesin filmurin, har Føroyar verða lýstar gjøgnum eyguni á hesum íslendska útoyggjabúgva og ævintýrara.

Sunnudag 26. kl. 21.15



Øll elska Lloyd
19 ára gamli studenturin, Lloyd Dobler, er ikki serliga trúgvandi, og størsta ynski hansara er at gerast kickboksari. Í øllum førum fram til ta løtuna, tá hann hittur vøkru og klóku Diane Court, ti tá broytist lív hansara av álvara.

Sunnudag 26. kl. 21.40

Ed
Fýra skúlavinir gera eina sínamillum avtalu um, at teir um fimtan ár skulu býta alt tað, sum teir hava lagt inn undir seg. Nú eru tey fimtan árini liðin. Ein teirra er vorðin millióningur, men hann hevur tó lítlan hug at býta hetta við hinar, sum mest sum einki hava fingið á skaftið.

Mánadag 27. kl. 11.05



A Bronx Tale
CANAL+GUL

Robert de Niro debuteraði sum leikstjóri við hesum væleydnaða filminum um 9-ára gamla Calogero. Hann veksur upp við tveimum fullkomuliga ólíkum fyrimyndum. Sínum hart arbeiðandi og heiðurliga pápa, og so mafiabossinum í grannalagnum, sum eisini verður eitt slag av pápa hjá lítla dreinginum.

Mánadag 27. kl. 15.30

Søgulig arbeiðspláss
Lego er í dag ein av heimsins størstu framleiðarum av leikum. Hetta hevði eingin droymt um, tá ein fátækur timburmaður í 30'unum byrjaði at gera bilar og djór burtur úr træi. Søgan um ídnaðarliga ævintýrið er eisini ein sonn donsk søga um dunnungan, sum gjørdist ein vakur svani.

Mánadag 27. kl. 19.00

C.S.I.
Grissom og hansara fólk verða kallað til eitt flogfar, har ein illur ferðamaður varð dripin. Ivaleyst var hetta neyðverja, ti ferðamaðurin var veruliga frá sær sjálvum, men tá CSI-liðið fer undir avhoyringarnar, kemur nakað heilt annað fram í ljósmála.

Mánadag 27. kl. 22.40



Harold Shipman -deyðans lækni
At síggja til er Harold Shipman ein bæði virdur og vælumtóktur lækni. Í veruleikanum er hann tó ein av størstu hópdrápsmonnunum í Bretlandi. Hann hugnaliga skjoldur hansara er hann ein maður, sum uttan at blunka hevur tikið lívið av hundratals sjúklingum.

VARPIÐ
Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

Týsdag 28. kl. 14.15

Andahol í Bronx
CANAL+

Helen Travis er nonne, og hevur áður verið alkolikari í 20 ár. Maður hennara og báðir synirnir eru deyðir av ávikavist alkohol og narko. Sum nunna rekur hon nú eitt heim fyri samfelagsins útkoyrdu í Bronx, New York. Filmurin byggir á sonnu søguna um eina fantastiska kvinnu.

Týsdag 28. kl. 14.20

Ótrúskapur
Hevnd. Meira enn triðingurin av teimum, sum annars líva sum pør, hava ella hava havt eitt sindur við síðuna av. Peter og Vibeke vóru grannar og livdi saman við hvør sínum hjúnarfelaga. Undir einari veitslu komu tey dekan ov nær, og vórðu forelskaði í hvørjum øðrum.

Týsdag 28. kl. 18.05

Mowgli
Tann stóri tikarin, Shere Khan, sum drap pápa Mowgli mundi eisini gjørt av við Meshuu. Mowgli ætlar sær nú at drepa Shere Khan afturfyri, men mamman biður og bønar hann um at lata vera.

Týsdag 28. kl. 20.00

Austin Powers
Í 1999 fer superagenturin, Austin Powers, á brúdleypsferð við freku og dragandi Vanessa Kensington. Á ferðini fáa tey eina eksplosiva gávu, sum aftur noyðir hann at liva einsamallan, og so má agenturin yvir øllum aftur í gongd.

Mikudag 29. kl. 13.20

Dreymurin um Hollywood
Fylgt verður við tveimum svenskum gentum, sum eru farnar tvørtur um Atlantshavið. Ætlanin var at finna eydnuna í Hollywood. Venjing, upptøkuroyndir og veitslur eru gerandisstreytir, men tað eru vónbrotini eisini.

Mikudag 29. kl. 19.00

Oliver's Twist
Í hesi sendingini ger Jamie Oliver tað, sum honum dámar allarbest. Mat til vinir sínar. Í sendingini hittir hann fólk úr øllum heiminum, og hann býður hesum heim til sín, soleiðis at hann kann geva teimum eina vælsmakkandi máltíð, sum tey ikki gloyma í bræði.

Mikudag 29. kl. 20.00

Undan Væðingini
Kanska um hundrað ár 2:4. Vit senda annan part av røðini hjá Hanusi Kamban um Janus Djurhuus skald. Hesin parturin snýr seg um lestrartíðina í Danmark.

Mikudag 29. kl. 20.00

Plump Fiction
Plump Fiction er ein skemtifilmur, sum snýr seg um teir báðar – sera óhepnu – leigudrápsmenninar, Jimmy og Julius. Saman arbeiða teir fyri ein av harðastu brotsmonnunum í Los Angeles, men ivaleyst var hetta ikki ætlanin við lívi teirra.

Hósdag 30. kl. 19.00

Náttarvakturin
Læknin Bobby Caffey er í loyndum forelskaður í Kim Zambrano, sum tó framvegis heldur saman við fyrrverandi manni sínum. Tá Doc Jerry Mankowitz og Carlos verða róptir út at hjálpa einum álopnum persóni, verða skot eisini latin móti teimum, og teir finna ikki brotsmannin.

Hósdag 30. kl. 19.30



Studentur í Svalbard
Heimsins norðasta fróðskaparsetur er í Svalbard. Í januar í fjør komu studentar úr 18 tjóðum til Longyearbyin í Svalbard at lesa. Tað fyrsta studentarnir læra, er at lata seg væl í og at skjóta hvítabjørnir. Norska sjónvarpið hevur fylgt teimum ta myrkastu tíðina, til sólin aftur kom undan kavi.

Hósdag 30. kl. 22.30



Himmler, Hitler og triðja ríkið
- Eg kann ikki snýta føraran. Eg skyldi honum alt mítt lív. Soleiðis segði Heinrich Himmler, sum var ein av fremstu monnunum í Triðja ríkinum. Ikki uttan orsøk helt Hitler, at Himmler var hansara mest trúfasti fylgisveinur, men sum ein annar Pætur endaði Himmler við at snýta leiðara sín.

Hósdag 30. kl. 01.25

Seven Days
Dr. Mentor verður ringdur upp av einum av bestu næmingum sínum. Axelrad greiðir frá, at hann hevur funnið út av nøkrum heilt fantastiskum, men skjótt vísir tað seg, at ókendir persónar ikki eru serliga fegnir um, at hann ætlar at kunna almenningin um hetta.

Leygardagur 25. kl. 17.00

Vitin
Gesturin í Vitanum er Eyðun Viderø, fyrrverandi løgtingsmaður heiman av Sandi. Hann sigur frá barnaárunum í Skálavík, og eisini tá hann fór fyrsta túrin skips við sluppini Jóhonnu. Skipari á ferðini var Klæmint Nielsen av Sandi. Eisini var hann við Beinir á línuveiðu í New Foundlandi, áðrenn hann fór til Grønlands, har fiskað varð við snellu.

Av øðrum upplivingum, sum hann sigur frá, kunnu nevnast, tá hann ikki slapp at mynstra orsakað av tuberklum, og eisini um, hvussu frálikt tað er fyri sál og sinn at vera í bakkanum.

Eyðun hevur álit sítt á Harran Jesus, og hevur í mong ár verið organistur í Skálavíkar Kirkju.

Malmberg Olsen hevur verið úti við mikrofonini, og Símun Hansen leggur sendingina til rættis.

Mánadagur 27. kl. 19.00

Skúlagáttin
Føroya Musikklærarafelag.

Gestur í sendingini Skúlagáttin er Sunleif Rasmussen, formaður í Føroya Musikklærarafelag. Spurt verður um støðuna og tilboðini, tá umræður at spæla uppá í føroyska skúlanum. Við støði í hvast orðaðari yvirlýsing verður eisini spurt um leiklutin hjá miðlunum, tá umræður at bera almenninginum tónleik. Í prátinum gevur Sunleif boð uppá eina góða tónleikasending í Útvarpinum, eins og hann velur eitt áhugavert tónleikastykki. Nú tónleikarar í høvuðsstaðnum hava sett sær fyri at fáa serstakan spælistað verður eisini nomið við hetta evnið. Í sendingini hoyra vit eisini Elinborg Joensen studentaskúlanæmingin, Gyðju Hjalmarsdóttir lærara og Paula Nielsen rektara.

Birgir Kruse leggur sendingina Skúlagáttin til rættis.

Ítróttur

HM hondbóltur úr Portugal

Leygardagin kl. 13.35
Innandura fótbóltur úr Aalborg

CANAL+
Sunnudagin kl. 13.55
Seria A: Lazio-Reggina
Sunnudagin kl. 20.00
NHL: Montreal-Chicago
Mánadagin kl. 19.30
Kick-off: Fótbóltur
Mikudagin kl. 19.55
Premier League: Liverpool-Arsenal
Mikudagin kl. 0.30
NHL: Carolina-Toronto
Hósdagin kl. 5.45
NHL: Hæddarpunkt

CANAL+
Leygardagin kl. 19.25
Seria A: Como-Roma
Sunnudagin kl. 19.25
Seria A: Udinese-Milan

Sunnudagin kl. 14.00
Hondbóltur: GOG-Ikast, k
Mánadagin kl. 10.00
V5-Travet

EUROSPORT
Tennis: Australian Open
WC skiðskjóting úr Antholz, Italia
WC skeleton úr St. Moritz, Schweiz
WC skíðlop úr Sapporo, Japan
WC skíðlop úr Hakuba, Japan
WC Strok úr Kitzbühel, Østrig
WC sleðu úr Igls, Eysturríki
WC størsnirr úr Maribor, Slovenia
WC snirr úr Maribor, Slovenia
WC snirr úr Kitzbühel, Eysturríki
WC bobsleðu úr Winterberg, Týsklandi
WC langrenn úr Oberhof, Týsklandi
EM ísdansur úr Malmø, Svøriki
Rally: Dakar 2003

HM-hondbóltur
Leygardagin kl. 12.25
FA-Cup: Gillingham-Leeds
Sunnudagin kl. 12.50
Íshockey, steypafinala: Odense-Herlev
Sunnudagin kl. 15.10
NFL: Gameday
Sunnudagin kl. 15.55
FA-Cup: Crystal Palace-Liverpool
Sunnudagin kl. 21.30
FA-Cup: Shrewsbury-Chelsea
Mánadagin kl. 10.25
NFS: Superbowl

Leygardagin kl. 10.20
NBA: Toronto-Orlando
Leygardagin kl. 13.30
NBA action
Leygardagin kl. 14.00
Bundesliga: Beinleiðis
Leygardagin kl. 02.00
Boksing: Fight night
Sunnudagin kl. 19.00
NBA: Dallas Mavericks-Portland Trailblazers

VARPIÐ